# Bjørk setti nýtt met

Bjørk Herup Olsen hevur um vikuskiftið luttikið í norðurlendskum landsdysti í Bergen. Kappingin, ið kallast Nordic Match U20, er kapping í frælsum ítrótti fyri ung. Bjørk umboðaði danska juniorlandsliðið, og var úttikin at renna 3.000m teinin. Her kom Bjørk á mál við tíðini 10.19,63 minuttum, ið er nýtt føroyskt met. Gamla metið, ið var 10.24,28, átti Bjørk sjálv. Næsta stóra avbjóðing hjá Bjørk verður, tá hon skal luttaka í DM fyri ung 13. og 14. september.



# Vunnu lítlu finaluna

**Katrin Olsen og Julianne Elander Rasmussen rukku ikki sjálvari OL-finaluni. Sunnudagin fingu tær tó nakað av uppreisn, tá tær vunnu B-finaluna**




*Katrin Olsen og Julianne Elander megnaðu ikki at rógva seg í OL-finaluna. Tær mistu ov nógv í startinum, og hóast vanliga góða endaspurtin, so rakk tað ikki til at vinna tað mista hesaferð*

*Mynd: Polfoto*

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað kann illa sigast annað, enn at lutakastið ikki var við Katrini og Julianne, tá hálvfinalurnar í teirra bátaflokki vóru settar saman.

Fríggjamorgunin eydnaðis teimum nevnliga ikki at rógva seg í OL-finaluna, sum hevur verið málið seinastu árini hjá teimum báðum kvinnunum. Holland, Finnland og Týskland vóru tá framman fyri hálvgum føroyska bátin, og tey trý londini settu seg á trý av fýra fremstu plássunum í finaluni sunnudagin.

### Starturin kostaði

Fyri at verða partur av a-finaluni var neyðugt hjá Katrini og Julianu í minsta lagið at greiða triðja plássið í hálvfinaluni. Tað megnaðu tær ikki. Alexandre I, sum báturin hjá teimum báðum eitur, endaði á fjórða plássi.

Stóri trupulleikin hjá teimum báðu væl trimmaðu rógvarunum hevur verið, at startspurturin ikki hevur verið nóg góður. Soleiðis var tað eisini fríggjamorgunin. Skjótt eftir startskotið var danski báturin høgt aftastur av teimum seks luttakarunum. Tá ið 2000 metra teinurin var hálvrógvin, fóru tær báðar at ota seg fram, men tá var takið ov stórt, og tær endaðu á fjórða plássi.

Og so var eisini greitt, at føroyski luttakarin í OL kappróðrinum ikki longur hevði møguleika at vinna heiðursmerki.

**FAKTA**

**A-finalan**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Holland | 6.54,74 |
| 2 | Finnland | 6.56,03 |
| 3 | Kanada | 6.56,68 |
| 4 | Týskland | 6.56,72 |
| 5 | Kina | 7.01,90 |
| 6 | Grikkaland | 7.04,61 |

**B-finalan**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Danmark | 7.06,94 |
| 2 | Australia | 7.07,17 |
| 3 | Japan | 7.08,49 |
| 4 | USA | 7.09,02 |
| 5 | Bretland | 7.11,24 |
| 6 | Kuba | 7.20,07 |

# Heimsins skjótasti

**Hóast seinastu 20 metrarnar mest sum vóru spákaðir heim, so var tað eingin, ið kom í nær námind Usain Bolt í mest umrøddu kappingargreinini á OL**

OL
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*New World Record. Teksturin á skeltinum sigur tað mesta, og sjálvandi var Usain Bolt ovurfegin um sigurin á siðvanda 100-metra teininum*

*Mynd: Polfoto*

100-meturin hjá monnum. Hóast talan er um ríkiliga stórar mongdir av spennandi OL-finalum, so kemur eingin teirra í nær námind renningini á stytsta teininum.

Leygarmorgunin skuldi slagið so standa, og hesa ferð vóru øll eygu vend móti Usain Bolt og Asafa Powell. Ætlandi skuldi tvídysturin verða ein trídystur, men Tyson Gay heilkiksaði í hálvfinaluni, og tí var hann ikki við.

Og í finaluni var tað so Asafa Powell, sum kiksaði. Hann brúkti "heili" 9,95 sekund um teinin, og tað rakk bert til eitt fimta pláss.

Men tað er nú ivasamt, um tað hevði broytt nakað, um Powell rann sítt besta. Tí Bolt var í serflokki. Sjónvarpsmyndirnar mintu ikki sørt um ta ferðina, tá ein dopaður Ben Johnsson fegnaðist um sigurin í '88, langt áðrenn hann var komin um málstrikuna. Seinastu 20 metrarnar kundi Bolt hyggja til bæði høgru og vinstru. Strekkja armarnar til síðuna og buka seg sjálvan á bringuna, áðrenn hann sum skjótasti maðurin nakran tíð fór um málið.

Gamla heimsmetið var 9,72, og tað átti Bolt sjálvur. Til amerikonsku OL-úttøkuna rann Gay teinin í 9,69, men ta ferðina fekk hann hjálp frá einum ov hørðum undanvindi, og tí varð talan ikki um skrásett met.

Nú er Bolt altso fyrsti maðurin, sum hevur runnið teinin undir teimum 9,70 sekundunum.

